## Oljuprísurin rakar meint

Bretska flogfelagið Easyjet, sum er eitt av teimum sokallaðu lágprísfeløgunum, er meint rakt av tí høga oljuprísinum. Andy Harrison, aðalstjóri, sigur við BBC, at tann 7. februar kostaði oljan 840 dollarar fyri tonsið, og at hon nú kostar meiri enn 1.000 dollarar. Tað fer sambært stjóranum at kosta Easyjet góðar 425 mió. krónur eyka seinna hálvár í ár. Kortini væntar aðalstjórin ikki, at Easyjet fær nakrar trupulleikar av dýru oljuni.




*Easyjet væntar at styrkja sína støðu á marknaðinum, nú oljan er so dýr (Mynd: DR)*

# Sea Star Contractors spennandi verkætlan





*- Við nýggju blandistøðini fáa vit betong úr hágóðsku. Viðskiftafólk fáa ta blanding, tey vilja hava, sigur Jan Danielsen, stjóri*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Sea Star Contractors byggir elementvirki og bilverkstað inn á Rætt á Toftum. Felagið miðjar eftir at gerast heildarveitari av elementum til sethúsagrundir og dekkelementum, sigur stjórin í felagnum, Jan Danielsen**



*Felagið hevur havt nógv virksemi í Grønlandi við havnabyggingum og hevur eisini verið partur av verkætlanum við eitt nú háhúsum og barnagarði*

ÍDNAÐUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Felagið Sea Star Contractors hevur sløk fimm ár á baki. Tað vóru brøðurnir Jákup Martin og Høgni Kjeld, sum stovnaðu felagið á sumri 2003.

Undan stovnanini, hevði Jákup Martin eitt nú starvast í byggi-og entreprenørvinnuni, og Høgni hevði serliga fingist við at veita kavara- og sveisitænastur.

Sea Star byrjaði, sum navnið sigur, serliga sum felagið, ið fekst við skip og havnaløg, havnabyggingar og dýpingar.

Brøðurnir byrjaðu meira at kalla einsamallir í felagnum, men sum frá leið vaks felagið um sítt virksemi, bæði í Føroyum og uttanlands.

Í dag hevur Sea Star Contractors eini 50 fólk í starvi, harav stjórin Jan Danielsen og eitt annað fólk eru á skrivstovu felagsins.

Jan byrjaði at arbeiða hjá Sea Star Contractors, meðan felagið hevði stórt virksemi í Grønlandi. Hetta var á sumri í 2006, og 1. november sama ár varð hann settur stjóri.

Teir, sum eiga felagið, eru framvegis brøðurnir Jákup Martin og Høgni Kjeld.

### Største djúphavn

Í Grønlandi bygdi Sea Star Contractors eitt nú størstu djúphavn, sum er bygd í landinum. Hetta er ein 330 metrar langur og 40 metrar breiður pierur í Fiskifjørðinum, sum liggur millum Nuuk og Maniitsoq. Felagið hevur eisini verið við í fleiri øðrum størri og smærri byggiarbeiðum í Grønlandi.

Størsta virksemið seinastu tíðina hevur verið í Hovi, har felagið hevur gjørt betongarbeiði til bygg-ingina av nýggja miðnámsskúlanum, eins og felagið hevur bygt nøkur sethús og hevur stoypt fleiri sethúsagrundir.

Umframt at Sea Star Contractors serliga hevur sína styrki innan betongarbeiði, veitir felagið framvegis kavara-og sveisitænastur undir navninum Sea Star Diving.

Aðrar uppgávur, sum felagið eisini átekur sær, er reinsan og poleran av eitt nú skipsskrokkum, skrúðum og alinótum. Felagið hevur útgerð til at kanna skipsskrokkar og havnalegur við video-og myndaupptøkum og kann gera tjúkdarmátingar av stáli í tangum, rørum, skipum og spunsbryggjum.

Fyri einum góðum ári síðan fór felagið eisini í holt við at reka persónbilaverkstað í leigaðum hølum hjá OCD í Saltangará, har fýra mans eru til arbeiðis á verkstaðnum, ið eisini hevur dekksølu.

### Spennandi tíð

Størsta og mest spennandi verkætlanin, sum felagið í hesum døgum er í holt við, er byggingin av høllini á nýggja ídnaðarøkinum hjá Nes kommunu inni á Rætt.

Hetta er ein byggihøll, sum hevur eina gólvvídd, ið er tilsamans 800 fermetrar – við hølum til fyrisiting á 200 fermetrum í ovaru hæddini.

- Vit fara at brúka 600 fermetrar av gólvvíddini til framleiðslu av betongelementum og betongdekkum, meðan bilaverkstaðurin kemur at húsast í teimum seinastu 200 fermetrunum.

Jan Danielsen, stjóri, sig-